Argir 8. juni 2011
Málsnr.: 11/00395-1
Málsviðgeri: Jóhanna Olsen

# Uppskot

## til

## kunngerð um taðing

Við heimild í § 4, stk. 1, § 6, stk. 2, § 7, § 13, § 35, stk. 2, § 35 a, § 37, § 39, § 70 og § 72 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, verður ásett:

*Endamál og virkisøki*

**§ 1.** Endamálini við kunngerðini eru hesi:
1) at tryggja at taðing ikki elvir til dálking av umhvørvinum, heilsuvanda ella ampa í nærumhvørvinum,
2) og at tryggja. at tøð v.m. verða goymd undir tryggum viðurskiftum
3) at fremja nýtsluna av tøðum sum tilfeingi.
4)

**§ 2.** Kunngerðin fevnir um útbreiðslu av neytatøðum, súrhoyggjaevju v.m. og goymslu av hesum.

*Allýsingar*

**§ 3.** Í hesi kunngerð skilst við:
1) Ábyrgdarin er festarin, leigarin ella eigarin av jarðarlendinum.
2) Gróðrartíð er frá 1. apríl til 31. oktober.
3) Vatnveitingarlendi merkir lendi har drekkivatn verður savnað, samanber kap. 3 í umhvørvisverndarlógini.
4) Taðing: Við taðing skal skiljast ein útbreiðsla av tøðum, sum jørðin kann taka ímóti.
5) Taðingarlendi er lendið har taðingin lógliga kann fara fram, sbrt. § 7.
6) Djóraeind merkir ein mjólkkúgv uttan viðsetu, sum er inni alt árið. Ella 3 ungneyt, sum eru inni alt árið.

*Fyrisiting og eftirlit*

**§ 4.** Kommunan fyrisitur og hevur eftirlit við, at ásetingarnar í hesi kunngerð verða fylgdar. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

*Taðingarætlan*

**§ 5.** Kommunan kann krevja at ábyrgdarin ger eina taðingarætlan, sum lýsir hvussu taðingin verður skipað og hvar tøðini verða sprænd. Ætlanin skal sendast kommununi til góðkenningar.

*Stk. 2.* Tíðspunkt, nøgd og hvar taðað er skal skrásetast. Upplýsingarnar skula latast kommununi eftir umbøn.

*Avmarkingar*

**§ 6.** Taðing má bert fara fram í tíðarskeiðinum 1. apríl til 30. september. Taðingin skal í mest møguligan mun fara fram í byrjanini av hesum tíðarskeiði.
*Stk. 2.* Ikki er loyvt at taða sunnu- og halgidagar.

**§ 7.** Loyvt er ikki at taða á vatnveitingarlendum og í 50 metra fjarstøðu frá vatnveitingarlendum og vatnbrunnum.

**§ 8.** Loyvt er ikki at taða soleiðis at tøðini beinleiðis seta í áir, løkir, vøtn, tjarnir, á strondina ella á sjógv.
*Stk. 2.* Loyvt er ikki at taða í regni, tó er loyvt at taða í sirmi.
*Stk. 3.* Taðing er ikki loyvd tá lendið er fryst ella tá kavi liggur.
*Stk. 4.* Ikki er loyvt at taða í økjum, ið liggja yvir 200 metra hæddarkurvina, sí fylgiskjal 1.

**§ 9.** Í sambandi við spræning av tøðum nærhendis bústøðum, skulu atlit takast at ampar av lukti, taðsprutti, o.ø.
*Stk. 2.* So vítt møguligt skal ikki taðast tá ættin liggur ímóti bygdum øki, sbrt. góðkendari byggisamtykt.
*Stk. 3.* Í bý- ella bygdarøkjum er ikki loyvt at taða nærri enn 50 metrar frá bústøðum.
*Stk. 4.* Til tess at verja skónir og annan vøkstur skal so vítt møguligt skal taðast soleiðis at taðingin ikki rakar bøgarðar og hagagrót.
*Stk. 5.* Um ampar standast av taðingini, skal kommunan geva boð um bøtandi atgerðir. Kommunan kann eisini gera av at banna taðing í ávísum økjum.

*Goymslur o.t.*

**§ 10.** Mykjubrunnar, køstar, súrhoyggjabrunnar o.t. skula í minsta lagi rúma tí sum svarar til 7 mánaða framleiðslu av tøðum.

**§ 11.** Goymslan av tøðum skal staðsetast soleiðis at minst møguligur vandi er fyri dálkingaróhappum.
*Stk. 2.* Ábyrgdarin skal gera eina tilbúgvingarætlan, sum skal fevna um fyribyrging av dálkingaróhappum og hvussu farast skal fram um eitt slíkt hendir.

**§ 12.** Køstar, mykjubrunnar, súrhoyggjabrunnar o.t. skulu verða vatntættir bæði í botninum og í vegginum. Teir skulu hava lok og griðing skal verða rundanum.

*Taðingarlendi*

**§ 13.** Ábyrgdarin skal hava atgongd til nóg mikið av taðingarlendi til at spræna tøðini á. Í minsta lagi 0,4 ha. av lendi skulu verða tøk fyri hvørja djóraeind.
*Stk. 2.* Um tøð skula spjaðast á økir, sum ábyrgdarin ikki hevur ræðisrættindini á, skal ein skrivlig avtala fyriliggja, áðrenn taðingin fer fram.
*Stk. 3.* Kommunan kann geva frávik í støðd av taðingarlendi um undirskot er av føðsluevnum í jørðini.

*Gjøld*

**§ 14.** Kommunan kann áseta gjøld fyri góðkenningar og eftirlit eftir hesi kunngerð. Gjøldini mugu ikki vera hægri enn umsitingarkostnaðurin av tænastuni.

*Kæra*

**§ 15.** Avgerðir hjá kommununi kunnu, innan 4 vikur frá tí degi avgerðin er fráboðað, kærast til Umhvørvisstovuna.

*Revsing*

**§ 16.** Tann, ið brýtur ásetingarnar í §§ 5-15 í hesi kunngerð, ella ikki aktar boð givin við heimild í henni, verður, um ikki strangari revsing er ásett í aðrari lóggávu, revsaður við bót.
Stk. 2. Revsingin kann herðast til fongsul í upp til 1 ár, um brotið er framt við vilja ella av grovum ósketni, og um tað við brotinum er:
1) Voldur skaði á umhvørvið ella elvdur vandi fyri hesum, ella
2) fingin ella ætlaður peningaligur fyrimunur fyri viðkomandi ella onnur, her uppi í við sparing.

*Stk. 3.* Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitul 5 í revsilógini.
*Stk. 4.* Fyri brot v.m., sum eru nevnd í stk. 1. er fyrningarfreistin fyri revsiábyrgd 5 ár.
*Stk. 5.* Málini verða viðgjørd sum løgreglumál. Rættartiltøkini í rættargangslógini kapitli 72 (um at leggja hald á) og kapitli 73 (um rannsókn) eru tó galdandi í sama mun sum í málum, sum verða viðgjørd av statsadvokatinum.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 17.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Ásetingarnar sbrt. § 10 um goymsluviðurskifti, skulu verða fylgdar í seinasta lagi tann 1. januar 2015.

John Johannesen
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen
aðalstjóri

# Taðingarkort

